# Umhvørvis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 14. september 2021 |
| Mál nr.: | 21/17106 |
| Málsviðgjørt: | HI |

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 55 frá 16. august 1962 um tinglýsing, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 1. mai, 1973, løgtingslóg nr. 37 frá 29. mai 1985, løgtingslóg nr. 39 frá 5. mai 1987, løgtingslóg nr. 59 frá 10. mai 2000, løgtingslóg nr. 164 frá 22. desember 2005, § 3 í løgtingslóg nr. 111 frá 13. desember 2006, § 1 í løgtingslóg nr. 75 frá 25. mai 2009 og løgtingslóg nr. 70 frá 15. mai 2014, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 43.** Skjøl, ið ikki skulu tinglýsast sbrt. ásetingunum í kap. 6 a, og sum antin viðvíkja persóns ræði á leysafæ ella á ognarvirðum hansara yvirhøvur, og sum eftir niðanfyri standandi reglum krevja tinglýsing, verða førd inn í eina serstaka persónsbók.<br>*Stk. 2-6.* ... | **§ 43** Skjøl, ið ikki skulu tinglýsast sbrt. ásetingunum í kap. 6 a, og sum antin viðvíkja persóns ræði á leysafæ ella á ognarvirðum hansara yvirhøvur, og sum eftir niðanfyri standandi reglum ella aðrari lóggávu krevja tinglýsing, verða førd inn í eina serstaka persónsbók.<br>*Stk. 2-6.* ... |

| | |
|---|---|
| **§ 43. ...**<br>*Stk. 2-5. ...*<br>*Stk. 6.* Skjøl, ið tinglýst verða sbrt. § 1, kunnu snúgva seg um, at ein persónur bindur seg til ikki at undirveðseta ogn sína, sbrt. § 47, § 47 b, stk. 2, § 47 d, stk. 3, nr. 1-7 ella § 47 e, uttan samtykki frá tí, ið átalurætt hevur. Skjalið skal staðfesta, hvør hevur átalurætt. | **1.** Í § 43, stk. 6, verður "sbrt. § 1" broytt til "sbrt. stk. 1" og "nr. 1-7" broytt til "nr. 1-8".<br><br>**§ 43. ...**<br>*Stk. 2-5. ...*<br>*Stk. 6.* Skjøl, ið tinglýst verða sbrt. stk. 1, kunnu snúgva seg um, at ein persónur bindur seg til ikki at undirveðseta ogn sína, sbrt. § 47, § 47 b, stk. 2, § 47 d, stk. 3, nr. 1-8 ella § 47 e, uttan samtykki frá tí, ið átalurætt hevur. Skjalið skal staðfesta, hvør hevur átalurætt. |
| **§ 47 d. ...**<br>*Stk. 2.* Virkisveð skal vera tinglýst fyri at fáa gildi móti avtalum, sum í góðvari verða gjørdar við veðhavara, og móti rættarsókn.<br>*Stk. 3-7. ...* | **2.** Í § 47 d, stk. 2, verður "veðhavara" broytt til "veðsetaran".<br><br>**§ 47 d. ...**<br>*Stk. 2.* Virkisveð skal vera tinglýst fyri at fáa gildi móti avtalum, sum í góðvari verða gjørdar við veðsetaran, og móti rættarsókn.<br>*Stk. 3-7. ...* |
| **§ 47 e. ...**<br>*Stk. 2.* Kravsveð skal vera tinglýst fyri at fáa gildi móti avtalum, sum í góðvari verða gjørdar við veðhavaran, og móti rættarsókn. | **3.** Í § 47 e, stk. 2, verður "veðhavaran" broytt til "veðsetaran".<br><br>**§ 47 e. ...**<br>*Stk. 2.* Kravsveð skal vera tinglýst fyri at fáa gildi móti avtalum, sum í góðvari verða gjørdar við veðsetaran, og móti rættarsókn. |